# Øll í eldin

**StÍF, VB og Tjaldur høvdu øll frí seinasta vikuskifti, men nú skulu tey eisini í gongd, tá næsta hondbóltsvikuskiftið í vetur fer av barkastokki**

HONDBÓLTUR-KVINNUR
*Jákup Mørk*

Eftir at fleiri lið høvdu meira ella minni frí seinasta vikuskifti, tykist nú verulig gongd vera komin á hondbóltin.

StÍF hevði frí seinasta vikuskifti, men tær skulu nú av álvara royna seg, tá Kyndil skal fáa ferð á, eftir at tað fyri teirra viðkomandi kiksaði í frumframførsluni móti Neistanum. Spennandi verður at vita, hvørt tað verður nú, at Kyndil veruliga kemur ígongd. Í øllum førum var hugburðurin hin rætti, tá tær nærum stríddi seg inn aftur á Neistan fyri viku síðani.

Júst Neistin skal eisini aftur royna seg um vikuskiftið, tá tær fara til Klaksvíkar, har Stjørnan í ár hevur sett sær væl lægri mál, enn tær annars hava gjørt seinnu árini. Tó at tær siga setningin bert vera at yvirliva, so er lítið at ivast í, at tær fara at geva flestu mótstøðuliðunum mótstøðu, og Neistin fer helst á ongan hátt at rokna við nakrari lættari uppgerð sunnudagin.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum verður í Vági, har Tjaldur kemur á vitjan. Eins og hjá Stjørnuni, so eru vónirnar skrúvaðar munandi niður í Vági í ár, og tí er dysturin móti uppflutta Tjaldri helst ein góður mátistokkur hjá VB, soleiðis at tær kunnu peila seg eitt sindur inná, hvar tær flóta í ár.



*Neistin fekk fult, tá tær byrjaðu við grannauppgerð móti Kyndli, og nú skulu tær royna at byggja víðari upp á góðu byrjanina*

## Fótbóltur

### Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 17 | 12- 2 - 3 | 49 | 17 | 32 | 38 |
| 2 | KÍ | 17 | 10- 3 - 4 | 43 | 22 | 21 | 33 |
| 3 | NSÍ | 17 | 10- 3 - 4 | 35 | 19 | 16 | 33 |
| 4 | GÍ | 17 | 9 - 2 - 6 | 31 | 29 | 2 | 29 |
| 5 | B36 | 17 | 8 - 5 - 4 | 49 | 27 | 22 | 29 |
| 6 | B68 | 17 | 7 - 5 - 5 | 26 | 25 | 1 | 26 |
| 7 | VB | 17 | 6 - 4 - 7 | 18 | 18 | 0 | 22 |
| 8 | EB/S | 17 | 3 - 3 -11 | 18 | 40 | -22 | 12 |
| 9 | Skála | 17 | 2 - 4 -11 | 20 | 39 | -19 | 10 |
| 10 | TB | 17 | 1 - 3 -13 | 16 | 69 | -53 | 6 |

## Hondbóltur

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 1 | 1 - 0 - 0 | 26 | 21 | 5 | 2 |
| 2 | H71 | 1 | 1 - 0 - 0 | 18 | 14 | 4 | 2 |
| 3 | VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 2 |
| 4 | StÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 | Tjaldur | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 | KÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 14 | 18 | -4 | 0 |
| 7 | Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 21 | 26 | -5 | 0 |

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 30 | 18 | 12 | 2 |
| 2 | Neistin | 1 | 1 - 0 - 0 | 25 | 21 | 4 | 2 |
| 3 | StÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4 | Stjørnan | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 | VB | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 | Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 21 | 25 | -4 | 0 |
| 7 | Tjaldur | 1 | 0 - 0 - 1 | 18 | 30 | -12 | 0 |

# Strandingar koma við

*Bæði hoyvíkingar og kollfirðingar hava heimavøll í nýggju høllini um vikuskiftið, tá tey taka ímóti ávíkavist Tjaldri og Neistanum*



**StÍF byrjar við einum braki, tá teir í fyrsta dystinum vitja hjá hart spenta Kyndli**

HONDBÓLTUR-MENN
*Jákup Mørk*

Tað er kanska dekan ov tíðliga at siga, at lið eru í trongum skóm, men í øllum førum var byrjanin upp á árið ikki sum æltað hjá Kyndli, tá teir máttu lúta fyri Neistanum. Hesa ferð fáa teir grønu úr Havn vitjan av StÍF, og sum dystirnir millum hesi liðini hava verið seinnu árini, so er lítið at ivast í, at tað er eitt satt brak, sum bíðar eftir áskoðarunum sunnudagin.

Hoyvíkingar byrjaðu við einum sigri á KÍF, og aftur hetta vikuskiftið hava teir heimavøll, tá teir í Hoyvíkarhøllini taka ímóti Tjaldri. Tjaldur fekk ikki mannað lið seinasta vikuskifti, og tað boðar ikki frá eini serliga góðari upptakt, og undir øllum umstøðum eigur tað at vera til fyrimuns hjá H71, at runavíkingar hugsa meira um fótenn hondbólt.

Seinasti dysturin verður eisini í Hoyvíkarhøllini, tá KÍF tekur ímóti Neistanum sunnudagin. Avrikini farna vikuskifti bera í hvussu so er tann vegin, at Neistin er favorittur í hesum dystinum, men fyri tað er ikki sagt, at teir bláu bara uttan víðari kunnu fara í høllina eftir tveimum stigum.

# Tølini tala

| | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| EB/S-GÍ | 1-1 | - | - | - | - | - | - | 0-1 | - | - | 0-1-1 | 2-1 |
| TB-HB | - | - | - | 1-1 | - | 2-9 | 0-0 | 0-2 | 2-5 | 0-2 | 0-2-4 | 5-19 |
| B68-Skála | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| KÍ-NSÍ | 2-1 | 0-1 | 3-0 | 4-1 | 4-0 | - | 2-1 | 2-2 | - | 2-0 | 6-1-1 | 19-6 |
| B36-VB | 3-2 | 1-2 | 6-1 | 8-2 | 4-0 | 2-1 | 1-2 | - | 2-0 | 3-0 | 7-0-2 | 30-10 |

KÍ er greiður favorittur at vinna silvurmerkini, um søguligu hagtølini skulu takast sum grundarlag. Bert eina ferð seinastu 10 árini hevur NSÍ fingið fult stigatal við sær úr Klaksvík, og í flestum førunum hevur talan verið um sannførandi sigrar til KÍ.

Annars siga hagtølini, at B36 hevur eitt sera gott tak á VB í Havn, at tað vanliga er tætt, tá GÍ vitjar á Eiði, og so endilga, at HB hevur alla orsøk at rokna við sannari veitslu, tá teir leygardagin vitja á Tvøroyari.

Talvan niðanfyri sýnir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunudagin hava hitst í bestu mansdeildini seinastu 10 árini.

Vikuskifti

Nr. 191 • leygardagur • 5. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Av tíðindavakt at skriva ævisøgu

- Eg havi havt ambitiónir um at skriva bøkur síðan eg var blaðungur, sigur Jústinus Leivsson Eidesgaard, sum nú fer undir at skriva eina ævisøgu um rokskiparan Kaj Johannesen

Lesið síðu 4 & 5





*Tórun Sumberg, sum er sjónveik, hevur júst fingið prógv sum vevari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Veving er gott handverk fyri blind og sjónveik

Tórun Sumberg, sum er sjónveik, hevur júst fingið handað prógv sum vevari. Hon metir, at veving er eitt stak gott handverk fyri fólk, sum eru blind og sjónveik

VEVING
*Ingrid Bjarnastein*

Fyri góðari viku síðani fekk Tórun Sumberg handað prógv sum vevari. Hon er útbúgvin á Blindastovni Føroya og á Blindainstituttinum í Danmark. Í Føroyum hevur hon fingið praktiska undirvísing, meðan hon einaferð um árið í fimm ár, hevur verið niðri í Danmark í tríggjar mánaðar fyri at fáa teoretiska undirvísing.

Tórun er sjónveik. So sjónveik, at hon bara sær eitt sindur við høgra eyga. Men hetta er eingin trupulleiki, og hetta forðar henni ikki í at veva.

– Tað er ongin trupulleiki at veva. Blind kunnu eisini væl veva. Bara ein trupulleiki er, og tað er myndaveving, sigur Tórun Sumberg, sum fekk handað prógv sum vevari fríggjadagin í næst seinastu viku.

– Nógv halda, at veving er hondarbeiði, men tað er tað als ikki. Hevði tað verið eitt hondarbeiði, so hevði eg ikki fingist við tað. Sjálv meti eg, at veving er eitt stak gott handverk fyri blind og sjónveik.

### Vevar alt

Uppi á Blindastovninum var fyrst í vikuni ein framsýning við klædnapløggum og øðrum, sum Tórun hevði vevað. Har vóru turriklæði, gardinur, pútur, skjúrt, fyrikløð, anorakkar og nógv, nógv annað.

– Eg vevi alt, og mær dámar tað ógvuliga væl, greiðir Tórun Sumberg frá.

– Nú fari eg at halda fram við at veva og nú fari eg eisini at undirvísa í veving her á blindastovninum.

Tað tekur heili fimm ár at útbúgva seg sum vevara. Tórun byrjaði í september í 1997. Spurd um tað hevur verið strævið, svarar hon:

– Tá tað er yvirstaðið, hevur tað ongantíð verið strævið. Men tá eg hugsi um tað, so hevur tað verið rættiliga strævið at skula hava verið tríggjar mánaðar í Danmark um árið. Men samanumtikið hevur tað ongantíð verið so strævið, at eg havi hugsað um at givist.

Tórun heldur, at tað teoretiska, sum hon hevur tikið niðri í Danmark, er sera spennandi og týdningarmikið.

– Um tú ikki kennir tað teoretiska í vevinum, so klárar tú heldur ikki tað praktiska, sigur hon.

Og tá vit at enda spyrja, um hetta arbeiðið skal vera hennara lívsstarv, svarar hon avgjørd:

– Ja, tað skal tað!